# Stýrimenn

sansir.fo

Við hesum verður søkt eftir stýrimonnum til at seta í føst størv skjótast gjørligt.

Hesi kunnu til eina og hvørja tíð verða flutt umborð á øll skip hjá Strandfaraskipum Landsins, sum fyriskipað av leiðsluni.

Arbeiðs- og vaktarskipanin er fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein er settur umborð á.

**Størvini fevna um**
Stýrimaðurin skal vera við til at tilrættaleggja ein effektivan dagligan rakstur, og at tryggja at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni. Stýrimaðurin skal eisini vera við til at:

- Tryggja at trygdin umborð er í samsvari við altjóða krøv
- Tryggja at skipið verður lasta í samsvari við altjóða krøv
- Meta um viðlíkahaldstørvin umborð
- Seta upp mannagongdir fyri viðlíkahaldsarbeiði og dokking
- Samstarva við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar

**Førleikakrøv**

- STCW áteknað vinnubræv sum stýrimaður ella skipari við handilsskipum
- Heilsuprógv
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Sløkkileiðari
- Roykkavari
- STCW áteknað GMDSS GOC prógv
- Góðan røkjuskap
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 26. januar 2007, kl. 12:00

Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Regin Vágadal, rakstrarleiðara tlf. 34 30 00 lokal 3041, ella e-post: rev@ssl.fo

Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, og hevur sum endamál at nøkta landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Strandferðslan umsitur 29 farleiðir (7 Oyggjaleiðir og 22 Bygdaleiðir). Talið á flutningsførum er 8 ferjur og 40 bussar. Samlaða talið av starvsfólkum svarar til 120 ársverk.

STRANDFARASKIP LANDSINS



Klaksvíkar Kommuna I Svimjihøllin



# LÍVBJARGARI

**Søkt verður eftir mannligum lívbjargara til Klaksvíkar Svimjihøll at byrja tíðliga í 2007.**

**Høvuðsuppgávurnar eru:**

- At arbeiða sum lívbjargari, herundir at luttaka í vaktarskipan
- At virka fyri, at trygdin verður yvirhildin í svimjihøllini
- At virka fyri, at reinførisreglur verðr yvirhildnar
- At avgreiða atgongugjøld o.a. í atgongumerkjasøluni
- At vaska høll, brúsudeild, sauna v.m.
- At virka fyri at høllin er eitt reint og dámligt umhvørvi

**Vit sóknast eftir persóni, ið:**

- Hevur lívbjargararoynd, fyrstuhjálparaskeið og góðar eginleikar at lívbjarga (lívbjargaraskeiðið kann verða tikið til starvið)
- Er nærlagdur, røkin og álítandi
- Hevur góð samstarvsevni. Er blíður og fyrikomandi
- Hevur hugsjónir og áhuga innan svimjing
- Hevur góða heilsustøðu

**Aðrar uppgávur eru:**

- At samstarva um nýggj hugskot, kundanum at frama
- At taka lut í svimjihallarteknikki, so sum klorroyndir, PH-royndir v.m.
- At gera fyrifallandi umvælingar og viðlíkahald

**Vit kunnu bjóða:**

- Eitt spennandi arbeiði við nógvum opnum møguleikum
- Møguleikar at geva nýggj og góð hugskot til svimjihølllina

**Setanarviðurskifti:**

- Talan er um eitt fulltíðarstarv
- Lønar- og setanarviðurskifti sambært Starvsmannafelagssáttmálan, lønarflokkur 2
- Tilvísing til svimjihallarleiðaran
- Fyrsta árið er royndarár

**Fleiri upplýsingar**
fáast við at venda sær til Torkil Mørkøre svimjihallarleiðara á tlf. 21 97 12.

**Umsóknir,**
saman við prógvum, heilsuváttan og møguligum viðmælum v.m., verða at senda:

**Klaksvíkar Kommunu,**
**Postboks 2,**
**700 Klaksvík**

og skulu verða okkum í hendi **í seinasta lagi á middegi hósdagin tann 1. februar 2007.**

creð 458006

**Klaksvíkar Svimjihøll:**
Er ein av íalt trimum svimjihallum í landinum, sum hevur 25 metra svimjingarhyl. Inniheldur annars barna- og familjuvinarligt umhvørvi við grunnum hyli við ymiskum lutum at spæla við, hitarúm v.m.
Varð bygd í 1974. Er í løtuni undir um- og nýbygging og fer seinni í ár at lata upp við tí fyrstu, stóru skreiðibreytini í landinum, vatnlandi v.m.
Umframt leiðaran eru fýra starvsfólk í føstum starvi umframt eitt ávíst tal av avloysarum.

Klaksvíkar Kommuna I Nólsoyar Pálsgøta 32 I FO-700 Klaksvík
Tel. 410000 I Fax. 410001 I klaksvik@klaksvik.fo I klaksvik.fo



ÚTBJÓÐING

# Útbjóðing av lastbilaflutningi í 2007

**Heittblandað asfalt og skervur**
Flutningur av heittblandaðum asfalti og skervi úr Hundsarabotni og skervi av Hústoft verður við hesum boðin út alment.

**Forknúsað grót**
Flutningur av forknúsaðum gróti frá skervverkinum í Skørðunum og oman á havnarlagið í Porkeri verður við hesum boðin út alment.

**Suðuroyargrót, útlendskur skervur og sandur**
Flutningur av Suðuroyargróti, útlendskum skervi og sandi frá skipi við bryggju á Langasandi niðan í grótbrotið í Hundsarabotni, og av heittblandaðum asfalti og skervi oman á Langasand, verður við hesum boðin út alment.

Áhugað kunnu venda sær til avgreiðsluna hjá Landsverki, Tinghúsvegur 5, tlf. 340 800, har fráGreiðing og treytir verða útflýggjað.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*



Sosialurin
Sosialurin
i